# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali





**Partur 17**

- Hetta var gott, sigur Jógvan. Nú skulu hesir búrhundarnir í geglið, og so skulu teir sita har øll jólini, á nýggjárinum og langt inn í komandi ár. Stampi og Anthonio gráta.

- Vit skulu lova, at vit ongantíð skulu stjala aftur.

Men har er einki at gera, eingin lurtar eftir teimum.

- Men hvussu skulu vit fáa gávurnar oman í bygdina aftur? Børnini bíða jú spent eftir gávunum, sigur jólamaðurin.

- Vit kunnu hjálpa tær, sigur Trølla Omman.

- Tað er vakurt gjørt av tykkum, og tað sigi eg stóra tøkk fyri - eg havi brúk fyri allari hjálp. Latið okkum øll fylla gávurnar í posarnir, og latið okkum síðani fáa Leikamafiuna handan lás.

Tey hjálpa øll til at fylla gávurnar í posarnir, og løtu seinni ganga tey øll oman móti bygdini.

Jógvan og Erling fremstir við Stampa og Anthonio framman fyri sær, og síðani koma Jólamaðurin og trøllini við fullum posum á rygginum.

Tá tey koma oman í bygdina, tekur alt bygdarfólkið og borgarstjórin í móti teimum. Síðani fer alt fylgið yvir til jólatræið á torginum. Jógvan stillar seg undir stóra jólatræið, traðkar upp á ein sodavatnkassa og rópar alt fólkið saman.

- Tað er mær ein stór gleði at boða frá, at vit nú hava funnið bandittarnir, sum hava stolið gávurnar, og at allar gávurnar eru afturkomnar.

Fólkini klappa bæði leingi og hart. Tað vil siga, øll uttan Kári Handilsmaður. Hann hevði ynskt, at gávurnar ikki komu afturíaftur, tí so høvdu øll verið noydd at keypt nýggjar gávur frá honum. Jógvan heldur fram.

- Eg eri sera glaður fyri, at málið nú er loyst, men áðrenn eg og Erling fara yvir á politistøðina við Leikamafiuni, so fara eg og Erling at biðja Trølla Ommuna og Trølla Pætur um ein eina umbering fyri, at vit mistonktu tey fyri at vera tjóvarnir. Eg vóni, at tey vilja taka ímóti okkara umbering.

Trølla Omman og Trølla Pætur nikka.

- Eg vil líka skoyta uppí, at var tað ikki fyri Trølla Ommuni og Trølla Pætur, so vóru Stampi og Anthonio ikki fangaðir.

Og so kunnu øll fólkini ikki halda sær meira, men rópa, Trølla Omman og Trølla Pætur - leingi livi – HURRA HURRA HURRA.

- Eg vil at enda bara boða frá, at meðan eg og Erling fara yvir á politistøðina við Stampa og Anthonio, so fara jólamaðurin, Trølla Omma og Trølla Pætur at býta allar jólagávurnar útaftur. Tá vit so koma aftur, so havi eg eitt uppskot – og tað er, at við øll somul fara at dansa rundan um jólatræið.

Og nú eru øll fólkini so glað.

- Jógvan og Erling – teir leingi livi – HURRA HURRA HURRA.

Og meðan Jógvan og Erling fara á politistøðina við Leikamafiuni, býta Jólamaðurin, Trølla Omman og Trølla Pætur gávurnar út til øll fólkini í Hvannadali. Trølla Omman dugir ikki at lesa, men Trølla Pætur fortelur henni, hvat stendur á pakkunum.

Børnini í bygdini eru sera fegin, og á øllum andlitunum sást eitt stórt bros.

Tá tey eru liðug at býta pakkarnar út, koma Jógvan og Erling aftur.

Borgarstjórin hevur ikki heilsað upp á politistarnir, og tað ger hann við at klemma teir bæði fast og leingi.

- Hvat skuldi vit gjørt uttan so góðar politistar sum tykkum? Tit eru teir bestu politistarnir í verðini – tað er eingin ivi um tað.

Jógvan og Erling eru sum verða man stoltir.

- Nå, rópar borgarstjórin.

- Nú fara at gera tað, sum Jógvan segði. Takið í hondina á hvørjum øðrum og lat okkum gera ein stóran ring rundan um jólatræið.

Og so byrjar borgarstjórin at syngja, og beinanvegin taka fólkini undir við honum.

»Eitt barn er føtt í Betlehem«.

Og meðan Jólamaðurin, Trølla Omman, Trølla Pætur, Jógvan, Erling, Kari Handilsmaður, borgarstjórin og øll fólkini í Hvannadali dansa og syngja um jólatræið, sita Stampi og Anthonio í geglinum og kúra. Hetta vóru ikki tey jólini, sum teir høvdu hugsað sær.

Men hvat fekk Trølla Pætur so í gávu frá Ossa og Trølla Ommuni?

Jú, frá Ossa fekk hann sjálvandi nógvar pengaseðlar og tveir ferðaseðlar suður í Suðurlond. Frá ommuni fekk hann eina vakra bláa súkklu.

*Hatta var søgan um Jólini í Hvannadali.*

*- Eg vóni at tit hava hugnað tykkum saman við mær. Hjá mær er bara eftir at ynskja tykkum eini gleðilig jól og eitt gott og spennandi nýggjár. Takk fyri.*



*Puntur 23 til jólakalendaran*



*Puntur 24 til jólakalendaran*


